# Øll eiga rættin til mál

EYÐGUNN SAMUELSEN
tingkvinna hjá Javnaðarflokkinum



Løgtingið hevði í vikuni sum fór aðalorðaskiftið um álitið Málmørk, ið málstevnunevndin, hevur latið landstýriskvinnuni í mentamálum. Málmørk snýr seg um, hvussu vit kunnu skipa ein almennan málpolitikk.

Í álitinum eru 76 tilmæli til myndugleikarnar. At fremja øll hesi tilmæli kostar 73 mió. kr. Hesin veruleiki ber í sær, at neyðugt er at raðfesta, hvat vit vilja. Hartil kemur, at onkur av tilmælunum eru sett í verk. Eitt yvirlit, ið vísir ein dagførdan status, er í framløguskrivinum frá landstýriskvinnuni. Tó meti eg, at tað er gott, at tað eru so nógv tilmæli í álitinum, tí tey kunnu nýtast sum eitt hugskotskatalog, ella sum ein visión fyri málpolitikkin í Føroyum.

**Málið hevur fleiri endamál**

Mál okkara hevur fleiri funktiónir. Tað er ein týdningarmikil mentannarberi, málið er fortreyt fyri øllum samskifti, og málið er okkara samleiki. Tí hevur tað alstóran týdning at orða ein almennan málpolitikk.

Í dag er starvsfólkapolitikkur ein týdningarmikil partur av einum og hvørjum nýmótans arbeiðsplássi. Hetta er ein ásannan av, at skal tað besta fáast burturúr tí vøru ella tænastu, ið virkið/stovnurin gevur, so snýr tað seg ikki bara um at fáa fatur á teimum bestu starvsfólkunum. - Tað snýr seg í eins stóran mun um at megna at halda fast í teimum góðu starvsfólkunum. Tí má arbeiðsgevarin leggja dent á trivnaðin og menningina hjá starvsfólkunum. Nakað á sama hátt, síggi eg endamálið við einum góðum málpolitikki.

Tað er ikki nóg mikið at fáa allar íbúgvarnar í Føroyum at nýta eitt gott mál. Málpolitikkurin má stremba eftir, ikki bert at halda fast í tí góða málinum og málburðinum, men allatíðina leggja tað soleiðis til rættis, at eggja verður til eina menning av málinum. Vit vita, at føroyska fólkið hevur stóran áhuga í málsligum spurningum, og at tað ger sær ómak við at vanda sær um málið. Hesin áhugið hevur stóran týdning, og tí eiga vit at skapa karmar, so áhugin verður hildin við líka og støðugt mentur.

**Framtíðaravbjóðingin**

Vit kunnu siga, at eitt er tær vanligu gerandisavbjóðingarnar viðvíkjandi málinum, sum altíð vilja vera í einum livandi samfelag. Nakað heilt annað eru framtíðaravbjóðingarnar, sum menningin av tøknini hevur skapa og framvegis skapar. Menningin innan samskiftistøkni hevur verið ovur stór og hevur gingið við rúkandi ferð, og henda gongd sær heldur ikki út til at steðga við bræðið.

Samstundis síggja vit, at ungdómurin tekur alla nýmenning innan samskiftistøkni til sín, so skjótt hon kemur fram. Verður mál okkara ikki ein integreraður partur av hesi menning, bíðar ein risastóra avbjóðing í at tryggja framtíðina hjá máli okkara fyri framman.

Av hesum orsøkum má ein hin fremsta raðfestingin í føroyskum málpolitikki vera at geva børnum okkara og okkara ungu eina breiða og fjølbroytta grund at standa á, við atgongd til øll tey amboð, ið eru til taks innan tilognanina av máli og menningina av føroyska málinum sum heild.

**Yvirskipaður málpolitikkur**

Løgtingið hevur samtykt, at landstýriskvinnan við kunngerð skal skipa eitt málráð við lóg. Ein nevnd skal setast at endurskoða grundarlagið undir málnevndini og virksemi hennara. Harumframt skal nevndin gera uppskot til lóg. Henda tilgongd er longu byrja.

Viðvíkjandi yvirskipaða málpolitikkinum, mælir landstýriskvinnan til, at eitt av høvuðsendamálinum við málpolitikkinum skal verða, at føroyskt skal kunna nýtast á øllum økjum í samfelagnum. Harumframt skal regluliga metast um, um broytingar eiga at verða framdar, tá tað er neyðugt innan rættskriving, aðrar málsligar reglar og orðafar.

**Rættin til mál**

Eg vil leggja orðingina í álitinum, at yvirskipaði málpolitikkurin skal tryggja øllum borgarum rættin til mál t.e tjóðarmál, móðurmál og fremmandamál, herundir eisini rættin til teknmál avtrat hesi endamálsorðing.

Hetta, at øll eiga rættin til mál, er eftir mínum tykki eitt tað týdningarmesta í okkara málpolitikki. Ofta fokusera vit sum um hin einasti trupulleikin er hann, at mál okkara ikki eigur sess á øllum rókum. - Eg havi hug at venda hesum á.

Um vit hyggja at øllum teimum í okkara samfelag, sum eru útihýst frá rættinum til mál, td. tey dulu, tey sjónveiku, tey tunghoyrdu, tey lesiveiku ella tey orðblindu. - Sibbarnar í flokkinum, ið vóru settir á aftasta bonk, sum vit øll minnast. Eg hugsi eisini um tey, ið orsaka av sosialum bakstøði ikki eru eins væl fyri, sum flest onnur, at ognað sær mállykilin, ið letur dyrnar upp til málheimin. Hesir bólkar í samfelagnum hava ikki somu møguleikar sum onnur at ogna sær málið, ella fáa gleði av teim óendaligu møguleikum, málið hevur at bjóða borgaranum.

At eiga eitt mál, at vera før/førur fyri at tosa, skriva og lesa, kann sammetast við ein lykil, ið letur dyr upp til gleðina við til dømis at lesa eina góða skaldsøgu, til spenningin við eini góðari krimisøgu, til undranina, tá tú skilir eina yrking.

Størst av øllum er tó, at tá tú dugir at nýta henda mállykil, tá gevur hann atgongd til allan lærdóm í heiminum.

Gransking úr øðrum londum vísir, at sosialt bakstøði og málførleiki, eru altavgerandi fyri okkara lívsleið. Hvussu vit duga at samskifta í barnagarðinum, hvussu vit klára okkum í fólkaskúlanum, um vit megna at ogna okkum eina miðnámsútbúgving, og um vit fara víðari til hægri lesnað. Gransking vísir eisini, at børn úr miðalklassanum hava ein fyrimun í okkara útbúgvingarskipan av teirri orsøk, at tey hava fingið málið og normarnir við móðurmjólkini. Barnið hjá eini flakakvinnu ella arbeiðsmanni má fyrst læra seg allar hesar førleikar og ikki fyrr enn hesir førleikar eru lærdir, kann barnið byrja at læra pensum.

Vit eiga tí at seta fokus á rættin til mál frá fyrstu ferð vit hitta barnið á dagstovni. Vit eru byrja at granska og gera nakað fyri tey, ið eru lesiveik, og hetta er at gleðast um. Viðvíkjandi sjónveikum og tunghoyrdum fólki, so er tað ikki sjálvsagt, at tey hava rætt til teknmál allastaðni í almenna rúminum. Tey hava ikki sjálvsagdan rætt til at luttaka í okkara fólkaræði. Her hugsi eg t.d. um tulking og teksting av valfundum og valsendingum osfr.

Tí er tað altavgerðandi at sláa fast í okkara málpolitikki, at øll eiga rættin til mál.

**Vinnan**

Vit eiga at seta krøv til tey, ið selja fartelefonir og til tey, ið senda fremmandar sjónvarpsrásir. Krøvini eiga at vera, at tey seta ávísar upphæddir av til føroyskt mál og orðabøkir á fartelefonirnar og føroyskan tekst á sjónvarpssendingarnar.

Tey, ið vinna nógvan pening við at senda fremmandar rásir í Føroyum áttu eisini at verið við til at fíggja eitt nú føroyskan tekst í barnasendingum og teknifilmum. Undir øllum umstøðum er vert at kanna, um hetta letur seg gera.

Ítøkiliga, so eigur fremsta raðfestingin í málpolitikkinum at vera børn og ung. Vit eiga at raðfesta dagstovnaøkið, tilfar til børn og ung í fjølmiðlunum, og at vit fáa fleiri undirvísingarmiðlar á føroyskum – eisini talgildar, serliga í fólkaskúlanum.

**Breið semja**

Vit vita at hetta krevur fígging. Nevndin mælir tí til 6 mió. kr. um árið, fyrstu fýra árini. Eg mæli tí til, at allir flokkar seta seg saman og koma ásamt um, hvussu stóra peningaupphædd teir vilja verða við til at seta av komandi fýra árini til málpolitisk átøk.

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Fólkaflokkurin og kollektivisman

HØGNI HOYDAL



**Tjóðveldi er til reiðar at taka við leiðsluni og at finna neyðugu semjurnar, ið kunnu fáa búskapin og samfelagið á aðra kós. Men tað krevur, at Fólkaflokkurin sleppur sínum blokeringum og sínum royndum at kollektivisera ábyrgdina og rokningarnar fyri ein blóðskeivan politikk**

Tað er ein sjáldan løgin og misvísandi yvirlýsing, ið Fólkaflokkurin knappliga hevur sent út til miðlarnar. Boðskapurin frá tí flokki, ið hevur sitið við valdið nærum uttan støðg síðani 1975 og øll seinastu 14 árini, er í stuttum, at allir flokkar og politikarar hava ábyrgdina av ve kollsigda búskapinum og vantandi politikkinum. Og at nú má sópast fyri egnum durum, har Fólkaflokkurin skal vera garanturin hjá tí vanliga borgaranum mótvegis teimum skilaleysu politikarunum (!). Hetta verður sagt samstundis sum Fólkaflokkurin er fremsti garantur fyri, at rokningarnar í løtuni bara verða sendar til teir veikastu samfelagsbólkarnar.

Hetta er eitt skúladømi um ta serligu kollektivismuna, sum Fólkaflokkurin tykist hava ment. Hon snýr seg um, at vinningurin og heiðurin skal altíð vera nøkrum fáum einstaklingum og flokkum beskorin. Meðan ábyrgdin, uppruddingin og rokningin er altíð kollektiv.

Tjóðveldi noktar blankt fyri at verða koyrdur í stórapott og fáa ábyrgdina fyri tann skilaleysa skatta- og búskaparpolitikkin og tann vantandi politikkin á øllum økjum undir ABC-flokkunum seinastu 6 árini – og ikki minst tað atgerðarloysi og niðurbræðing av øllum politikki, sum valdar í løtuni. Vit hava ávarað og havt alternativ uppskot til tær gerðir, ið eru framdar, alt síðani hesir flokkar tóku við í 2004.

Hinvegin taka vit treytaleyst við ábyrgdini fyri skeivar og vantandi avgerðir, ið vit hava havt lut í og ábyrgd av. Her er serliga at nevna fiskivinnupolitikkin og vantandi reformøar í samfelagsbygnaðinum, har vit ikki hava megnað at framt røttu avgerðirnar.

Vit taka fegin við leiðsluni og vilja gera alt fyri at arbeiða okkum fram til semjur um at fáa búskapin og samfelagið á aðra leið, ið kann skapa álit og greiðar linjur. Vit ivast heldur ikki í, at stórur politiskur meiriluti er fyri neyðugu politisku ætlanunum, um hetta bara ikki verður blokkerað av minnilutum í samgonguni. Higartil eru so øll uppskot feld frá okkum, hóast flestu tingfólk og flokkar siga seg taka undir við teimum, men vísa til vantandi samgongusemjur.

Tjóðveldi vísir á hesi mál, sum eru alneyðug og átroðkandi, har vit ikki ivast í, at semjur kunnu finnast millum 2/3 av tinglimum, um blokeringarnar verða loystar. Vit vóna, at hinir flokkarnir kunnu siga sína hugsan og at ikki minst Fólkaflokkurin hevur nøkur boð:

1. Langtíðarætlan fyri rakstur og inntøkur hjá landinum, har vit áseta hvussu hvørt rakstraøki skal minka, standa í stað ella minka komandi 5 árini til tess at fáa javnvág á fíggjarlógina.
2. Langtíðarætlan fyri íløgur komandi 15 árini – og beinanvegin gongd á tær íløgur, ið kunnu skapa virksemi og arbeiði í hesum ári og tí komandi.
3. Skattapolitikkur skal breiðka skattagrundarlagið, har m.a. umhvørvisskattur og skattur á spekulasjón fíggja størri part.
4. Fiskivinnupolitikkurin skal leggjast grundleggjandi um, nú alt bendir á, at stovnar kunnu koma fyri seg – og almenn tilfeingisbúð setast á stovn.
5. Kommunalreformur, har eisini skattagrundarlagið verður broytt, so kommunuskatturin gerst progressivur
6. Sosialpolitikkur, har teir veikastu bólkarnir verða vardir og stættarmunir javnaðir.
7. Útbúgving, mentan og gransking skulu standa fremst í øllum nýátøkum.
8. Umhvørvis- og orkupolitikkur skal verða partur av øllum samfelagsøkjum og avgerðum.